# Listaframsýning á turkihúsloftinum

*Loftið á turkihúsinum í Leirvík var stúgvandi fult av fólki, sum komið var til listafamsýningina, ið lat upp dýra biðidag*

EDVARD JOENSEN

Tað legðist alt meira til, sum klokkan fór av trý seinnapartin dýra biðidag. Loftið á gamli turkihúsinum í Leirvík, har partafelagið Sjóborg nú heldur til, var fult av fólki, sum komið var til forvitnisligu listaframsýningina, ið lat upp hendan dagin.

Talan var um listaverk, sum málarar úr Leirvík høvdu málað. Bæði um verk, sum stigtakarin, Osmund Justinussen, reiðari, hevði keypt, og nýggj verk hjá leirvíksmálaranum Sámali Toftanes.

Fólk gingu og hugdu og tosaðu. Mettu og hugdu aftur, alt meðan ein ungur maður kom við einum lítlum fiskakassa mitt inn í hetta pyntaða selskapið.

Jú, tygum kollgittu. Tað var talarastólurin, sum stigtakarin skuldi standa á, tá hann setti framsýningina. Kassin varð vendur upp og niður, og Ossi fór upp á botnin, sum nú vendi upp, at standa. Hann klappaði einar tvær ferðir, og fekk so ljóð.

Osmund Justinussen segði, tá hann setti framsýningina, at hann vónaði, at myndirnar hjá Sámali fóru at verða hangandi. Men tað vónaði Sámal ikki, segði Osmund, tí Sámal vildi sleppa at seja myndirnar.

Osmund Justinussen segði, at hann hevði havt eitt sindur av høvuðbrýggi av, hvørt nú nakar mundi fara at koma at síggja framsýningina ella ikki. Men her var fult, og tað gleddist hann ómetaliga nógv um, segði hann.

Tá hann var smádrongur, segði Osmund Justinussen, hevði hann trý stór ynski. Hann vildi verða stjørnufrøðingur. So vildi hann verða veðurfrøðingur. Og at enda vildi hann verða málari.

Hetta seinasta komst av, at hann einaferð sum smádrongur hevði sæð bygdarmannin Jóannes Kristiansen standa í Leirvíkstúni og mála.

Men einki av hesum trimum varð hann til. At mála dugdi hann ikki, og úr Leirvík mundi fara at verða ringt at fáa ein stjørnufrøðing, helt hann. Tó, segði Osmund, kom hann nokk so nær at tí at verða veðurfrøðingur. Hann helt í hvussu er sjálvur, at hann hevði nøkulunda skil á veðrinum.

Osmund Justinussen tosaði eisini um annað enn bara málningar. Hann hevði kenslur fyri hesum húsinum, listaframsýningin var í, skiltist. Her hevði hann, sum so mangur leirvíkingur, vunnið síni fyrstu oyru, tá fiskaarbeiði var her.

Hann segði seg minnast, at hann keypti sær eitt súrepli og eina maltøl burtur av fyrstu avrokningini. Honum dámdi so ómetaliga væl maltøl sum smádrongur. So væl, at hann gekk og ynskti at fáa influensu, tí so mátti mamman geva honum heitt maltøl, soleiðis, sum tey mangan gjørdu tá.

Framsýningin í turkihúsinum verður ein permanent framsýning, segði Osmund Justinussen. Framsýningin er ætlað bygdarfólkinum í Leirvík. Er tað soleiðis, at tey til dømis hava hug at vísa fremmandafólki framsýningina, fer tað altíð at bera til.

Framsýningin er í somu hølum, sum skrivstovan hjá Sjóborg, so sjálvandi ber helst ikki til at hava fólk gangandi allan dagin og hyggja at málningum. Men verður tað so, at tað verður alment opið, verður lýst við tí, segði Osmund Justinussen.



*Osmund Justinussen hevur keypt fleiri málningar, sum málarar úr Leirvík hava málað. Ætlanin er, at teir skulu hanga á eini permanentari framsýning í hølunum hjá P/F Sjóborg á loftinum í gamla turkihúsinum í Leirvík. Osmund Justinussen setti framsýningina dýra biðidag. Samstundis lat eisini Sámal Toftanes, málari úr Leirvík, upp eina søluframsýning í somu hølunum ( Mynd: Edvard Joensen)*

# Nýggjur Viti í Fuglafirði

*Fuglfirðingar komu dýra biðidag úr Noreg við enn einum sandbáti, sum hevur fingið navnið Vitin. Tað er Sandgrevstur, sum eigur henda stóra sandbátin*




*Nýggi Vitin kom á Fuglafjørð dýra biðidag (Mynd: Edvard Joensen)*

EDVARD JOENSEN

Nýggi Vitin, sum kom á Fuglafjørð dýra biðidag, lastar umleið 1.200 tons, sigur reiðarin, Gordon Martin Midjord. Hann myndar saman við pápanum, Peturi Midjord, Sandgrevstur.

Sandgrevstur er gamalt felag. Tað er farið um ta hálvu øldina. Tað var Gordon Midjord í Fuglafirði, abbi núverandi reiðaran, sum byrjaði hetta virksemið við sandbátunum. Nú annað og triðja ættarlið standa fyri, hava teir keypt tann 10. bátin hjá felagnum.

Gordon Martin Midjord sigur, at skipið væntandi verður brúkt til annað enn at føra sand við. Til dømis var tað fult av korni, sum Havsbrún skal brúka til fóðurframleiðslu, nú tað kom á Fuglafjørð. Og soleiðis fer skipið helst at verða brúkt til slíkt, sum førast skal, sigur reiðarin.

Talan er um eldri skrokk, sum er umvældur. Maskinan er nýggj. Reiðarin, Gordon Martin Midjord, leggur ikki í at siga, hvat skipið kostar.





# Norðborg misti ein mann

*Norðborg úr Klaksvík misti ein mann norðan fyri Føroyar dýra biðidag*

EDVARD JOENSEN

Nótaskipið Norðborg, sum leitaði eftir sild norðan fyri Føroyar, misti ein mann dýra biðidag.

Av politistøðini í Klaksvík verður sagt, at tey fingu fráboðan um, at Norðborg hevði mist ein mann norðan fyri 64 stig og umleið 4 stig vestur.

Norðborg fekk ein sjógv, meðan menn arbeiddu á dekkinum, og ein av manningini varð tikin út. Tað eydnaðist ikki at fáa mannin aftur

Skipini hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni vóru stødd so mikið langt frá vanlukkustaðnum, at tey fingu ikki verið við í leitingini eftir manninum. Men onnur fiskiskip á leiðini, føroysk, donsk og íslendsk, leitaðu uttan úrslit.

Maðurin, sum Norðborg misti, er ein 33 ára gamal føroyingur, sum býr í Danmark, verður sagt av politistøðini í Klaksvík.

Norðborg kom á Klaksvík leygarkvøldið, og sjófrágreðing verður í Klaksvík mánadagin.

# Grein 13 og ferðkanningar í Eysturoynni

*Tveir bilførarar eru í vanda fyri at missa koyrikortið eftir ferðkanningarnar, sum løgreglan í Eysturoynni gjørdi um vikuskiftið*

SVEINUR TRÓNDARSON

Løgreglan í Eysturoynni nýtti arbeiðsfriðin um vikuskiftið til at gera grein 13 kanningar og ferðmátingar.

Leygardagurin varð í høvuðsheitum brúktur til grein 13 kanningar, og út við 70 bilar vórðu kannaðir. Í 15 førum mátti løgreglan skrivað frágreiðing. Eisini vórðu fýra bilar steðgaðir fyri at koyra ov skjótt, og ein teirra er í álvarsligum vanda fyri at missa koyrikortið eina tíð.

Brotini, sum løgreglan staðfesti leygardagin vóru serliga gloymdir trygdarselar og gloymd koyrikort. Onkur døglingur var eisini ímillum.

Hesin koyrdi meiri enn 80 kilometrar um tíman í bygdum øki, og tað er meiri enn 30 kilometrar ov nógv.

Sunnudagurin varð serliga brútkur til ferðmátingar. Kappróðurin var á Skála, og hóast hann var lýstur at vera klokkan trý, so var onkur, sum var farin ov seint heimanífrá. Ellivu bilførarar vóru steðgaðir fyri at koyra ov skjótt gjøgnum Skálabotn, og aftur sunnudagin var ein, sum koyrdi so nógv ov skjótt, at koyrikortið er í vanda.

# Friðarligir suðuroyingar

*Bygdastevna var eisini í Hvalba um vikuskiftið og eins og á Skála gekk alt friðarliga fyri seg*

SVEINUR TRÓNDARSON

Stevnuhýrurin er við at leggja seg yvir landið. Summar nærkast og veðrið hevur verið av tí heilt fræga í langa tíð.

Um vikuskiftið vóru tvær bygdastevnur og hóast fitt av fólki var í býnum, so var lagið gott, og bara gott.

Løgreglan sigur av Tvøroyri, at tað var serstakliga friðarligt sunnanfjørðs um vikuskiftið. – Vit koyrdu eitt sindur runt við bilinum, men funnu tíbetur ongan, sum koyrdi við kenning. Okkurt annað smávegis var. Onkur koyrdi við píkum og onkur annar koyrdi ov skjótt, men tað var alt, sigur vakthavandi á Tvøroyri.

So er at vóna, at góði hýrurin fer at halda sær summarið av.

# Skattareglurnar munandi lagaligari í grannalondunum

Havbúnaðarfelagið hevur fleiri ferðir víst á, at skattareglurnar eru munandi lagaligari í grannalondunum, t. d. í Noregi. Á hesum økið er kappingin tí ikki á jøvnum føti, skrivaði Vinnuhúsið herfyri í tíðindaskrivi.

Víst var til kanning, og varð mælt til, at »carry back« reglur koma inn í føroysku skattalógina, á sama hátt sum í Noregi, t. v. s. at skattur goldin eitt ár kann í tvey ár verða goldin felagnum aftur, um tað vísir seg, at felagið fær undirskot innan fyri hetta tíðarbil, og at tíðarbilið, har hall kann førast fram og dragast frá skattliga úrslitinum, verður longt upp í 10 ár.

Her er vert at viðmerkja, at Endurreisingarnevnd landsstýrisins í áliti sínum í 1994 vísti á hesi viðurskiftir. Skattalóg okkara tekur í hesum viðurskiftum støði í tí donsku, ið er tillagað donskum samfelagsviðurskiftum og ikki einum samfelag, sum tað føroyska. Bæði ali- og fiskivinnan eru tengdar at náttúruviðurskiftum og kunnu tí hava stórar og óvæntaðar broytingar frá ári til árs. Og hetta eigur skattalógin at leggja upp fyri.

# Styrkja fíggjarliga eftirlitið við kommunustýrislógina

*Løgmaður umhugsar at søkja um umleið 250.000 kr. í eykajáttan til at styrkja fíggjarliga eftirlitið í sambandi við nýggju kommunustýrislógina, sum liggur í Løgtinginum til viðgerðar og arbeiðið við nýggjum kommunubygnaði, sigur Anfinn Kallsberg í svari*

ÓLAVUR Í BEITI

Tað var Jóannes Eidesgaard, løgtingsmaður, sum bað Anfinn Kallsberg geva eina meting av samlaðu nýtsluni, innan § 2 á fíggjarlógini (Løgmansfyrisiting v.m.) fyri ár 2000, á øllum konti, har mett verður at játtanin ikki kemur at halda. Og um løgmaður ikki metir, at játtanir koma at halda, hvørji stig ætlar hann so at taka fyri at tryggja, at hesar halda? spurdi Jóannes Eidesgaard.

Í svarinum, sigur Anfinn Kallsberg, at væntandi verður tørvur á eini meirjáttan til umboðan uppá umleið 300.000 kr. orsakað av drotningavitjan. Harumframt ætlar løgmaður at søkja um umleið 400.000 kr. í eykajáttan til framhaldandi hernaðarkanningar

Og viðvíkjandi viðskiftastovuni í Keypmannahavn, upplýsur Anfinn Kallsberg, at møguliga verður tørvur á eykajáttan, orsakað av, at leigararnir á Viðskiftastovuni í Keypmannahavn hava sagt leigumál teirra upp.

**Nýggjur landsstýrismaður**

Viðvíkjandi arbeiðinum av nýggjum kommunubygnaði, sigur Anfinn Kallsberg, at tørvur verður á at gera eina útreiðsluneutrala flyting uppá umleið 50.000 kr. frá rakstri til lønir. Harumframt umhugsar løgmaður at søkja um umleið 250.000 kr. í eykajáttan til at styrkja fíggjarliga eftirlitið í sambandi við nýggju kommunustýrislógina, sum liggur í Løgtinginum til viðgerðar og arbeiðið við nýggjum kommunubygnaði.

Og verður verður nýggjur landsstýrismaður tilnevndur innan 1.9.2000,verður talan um øktar útreiðslur uppá umleið 50.000 kr. um mánaðin til samsýning v.m. í tíðini frá tilnevningardegnum til 1.10.2000.

Til seinna spurningin, sigur Anfinn Kallsberg, at vísir tað seg, at játtanir á ávísum høvuðskonti ikki fara at halda, verður løgmaður fyrst atkanna, um til ber at tillaga virksemið ella finna sparingar á hesum økjum til tess at halda játtanina. – Um hetta ikki verður hildið at bera til, verður uppskot um eykajáttan lagt fyri tingið, sum í mest møguligan mun er útreiðsluneutral, sigur løgmaður m.a. í svarinum.

# Eldur á deild tvey á Landssjúkrahúsinum

*Fyrrapartin fekk løgreglan fráboðan um, at tað var eldur í á deild tvey á Landssjúkrahúsinum*

SVEINUR TRÓNDARSON

Klokkan hálvgun ellivu fyrrapartin fekk løgreglan í Havn boð um alarmsentralin, at eldur var í á deild tvey á Landssjúkrahúsinum.

Fólk varð sent á staðið alt fyri eitt, men tíbetur var eldurin sløktur áðrenn hann fekk fastatøkur.

Vakthavandi á løgreglustøðini í Havn sigur við Sosialin, at tað var eitt skamlop í einum málaraskápið, sum var orsøkin til eldin.

Av tí, at tað var so skjótt borið at, var so at siga eingin brandskaði, men eitt sindur av roykskaða var kortini.